# Tarin er føroyska grannið

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndir: Jens Kristian Vang*
*Tilfar: 2x3 á Hálsi*

**Fjøran og vøkru brendu sjólitirnir hava givið okkum íblástur til jólapyntið í ár. Tí bóðu vit tær báðar kreativu kvinnurnar, Astrid Andreasen, listakvinnu, og Brynhild Dalsgaard, blómuseljara, um at vísa okkum, hvussu vit kunnu brúka føroyskt sjógæti at pynta við á jólum – sum eitt ískoyti til innflutta grannið**



*Hugflogið hevur ongin mørk, og tíbetur fylgjast evnini at finna uppá við evnunum at skapa*



*Í jólapyntinum, sum Astrid hevur gjørt fyri Rákið, hevur hon millum annað brúkt tara, goggur, fliður, igulker og skeljar. Sum teknari fyri Náttúrugripasavnið hevur Astrid Andreasen, um nakar, skil fyri dýrgripunum, sum eru at finna undir vatnskorpuni og framvið sjóvarstrondini*



*Astrid Andreasen, listakvinna, er ein ordiliga jólanissa. Umframt at vera kreativa sálin handan vøkru gullflykrurnar hjá Postverkinum, er hon eisini upphavskvinnan til ársins jólamerki*

